Kunningarlepi

Karnitin FAP 333 mg tablettir A16AA01

Karnitin FAP 100 mg/ml oralur loysingur

Karnitin FAP 100 mg/ml oralur loysingur (uttan kolhydrat)

Les kunningarlepan væl, áðrenn tú byrjar at taka Karnitin. Týdningarmiklar upplýsingar standa á honum.

Tú kanst fáa Karnitin FAP 333 mg tablettir og Karnitin FAP 100 mg/ml oralan loysing í handkeypi. Karnitin FAP 100 mg/ml oralur loysingur (uttan kolhydrat) er forskriftaheilivágur og persónligur.

- Goym kunningarlepan. Tað kann vera gott hjá tær at kunna lesa hann aftur.
- Spyr á apotekinum, vilt tú fáa meira at vita.
- Tosa við læknan ella apotekið, verða hjáárin verri, ella tú fært hjáárin, sum ikki eru nevnd á kunningarlepanum.

Yvirlit yvir kunningarlepan:

1. Virknaður og nýtsla
2. Hetta skalt tú vita, áðrenn tú tekur Karnitin
3. Soleiðis skalt tú taka Karnitin
4. Hjáárin
5. Soleiðis skalt tú goyma Karnitin
6. Aðrar upplýsingar

1. Karnitin virknaður og nýtsla

Karnitin hevur ein avgerandi leiklut í framleiðslu av orku í kroppinum. Karnitin flytur feittsýrur inn í mitochondriini, har tær verða brúktar til at framleiða orku. Vøddakyknur, eisini tær í hjartanum, nýta feittsýrur sum høvuðsbrennievni. Tí er tað serliga umráðandi, at hesar kyknur hava nóg mikið av karnitini, soleiðis at feittsýrurnar kunnu verða evnisskiftar munadygt. Karnitin hjálpir eisini við at burturbeina ávís evni, sum kunnu órógva orkuframleiðsluna í kyknunum.
Fólk, ið hava fingið staðfest Carnitin Transporter Deficiency (CTD), kunnu koma at mangla karnitin. Tá er tað av alstórum týdningi at fáa karnitiískoyti.

Karnitintablettir og oralur loysingur er heilivágur, sum verður nýttur sum karnitinískoyti til fólk, ið hava CTD, og til fólk, ið av aðrari orsøk hava fingið staðfest lágt karnitininnihald í blóðinum.

Læknin kann hava ávíst aðra nýtslu. Ger altíð eftir ávísing frá lækna.

2. Hetta skalt tú vita, áðrenn tú tekur Karnitin

Fyrivarni:

Tak ikki Karnitin, um tú:

- ert ovurviðkvæmur fyri karnitin ella einum av hinum innihaldsevnunum, ið eru í Karnitin FAP tablettum og Karnitin FAP oralum loysingi.

Tosa við læknan, áðrenn tú tekur Karnitin, um tú:

- Hevur neurologiskar fylgir vegna CTD
- Hevur viðføtt evnisskitligt ólag
- Hevur livurskorpnan
- Hevur nýraviknan

Onnur heilivágsnýtsla:
Sig altíð læknanum frá, um tú ert í viðgerð við karnitini.

Tosa við læknan, um tú tekur hesi sløg av heilivági:

- Pivmecillinam og pivampicillin
- Valproat
- Warfarin

Matur, drekka og alkohol:
Karnitin kann verða tikið aftur við mati og drekka. Men tað er ikki neyðugt.

Barnakonur og bróstageving:
Barna- og bróstakonur eiga bert at taka hendan heilivág í samráð við lækna. Tá kvinna gerst við barn, lækkar karnitininnihaldið vanliga, og tað skal havast í huga, um kvinnan undan barnsburðinum er í viðgerð.

Ferðslu- og arbeiðstrygd:
Karnitin ávirkar ikki arbeiðstrygdina ella førleikan at koyra bil og at ferðast trygt í ferðsluni.

3. Soleiðis skalt tú taka Karnitin

Fylg altíð tilmælinum frá læknanum.

Skamtur verður ásettur av lækna út frá úrsliti av karnitinkonsentratiónini í blóðroynd. Dagligi skamturin skal helst býtast í 3 - 4 fyri at fáa eina so javna konsentratión í blóðinum sum møguligt.

Karnitin FAP 333 mg tablett:

Vegleiðandi byrjanarskamtur:
Vaksin og børn yvir 15 ár: 3 Karnitin 333 mg tablettir 3 ferðir um dagin.
Børn undir 15 ár: 50 – 200 mg/kg/samdøgur býtt á 4 skamtir.

Skamturin verður síðani reguleraður út frá mátingum av karnitininnihaldinum í blóðinum. Vanliga er hægsti skamturin 3 g um samdøgrið.

Karnitin FAP 100 mg/ml oralur loysingur:

Vegleiðandi byrjanarskamtur:
Vaksin og børn yvir 15 ár: 10 ml 3 ferðir um dagin.
Børn undir 15 ár: 50 – 200 mg/kg/samdøgur býtt á 4 skamtir.

Skamturin verður síðani reguleraður út frá mátingum av karnitininnihaldinum í blóðinum. Vanliga er hægsti skamturin 3 g um samdøgrið.

Børn yngri enn 15 ár eiga ikki at taka karnitin uttan í samráð við lækna.

Hevur tú tikið ov nógv Karnitin:
Um tú hevur tikið meira Karnitin, enn tað stendur á hesum kunningarlepanum, ella fleiri enn læknin hevur ávíst, so set teg í samband við læknan, skaðastovuna ella apotekið.

4. Hjáárin

Karnitin, eins og allur annar heilivágur, kann hava við sær hjáárin.

Hjáárinini niðanfyri eru komin fyri í sambandi við heilivág, ið inniheldur karnitin.

Um tú tekur størri nøgdir av karnitini í longri tíð, kunnu hjáárin koma frá sodningarleiðini, t.d. vaml, spýggja, magakrampi og leyst lív. Hesi hjáárinini eru ofta í byrjanini og minka síðani við tíðini. Eisini kunnu hjáárinini linnast við at taka tablettirnar aftur við eini máltíð.

Kroppurin kann fáa ein fiskakendan lukt. Hetta er tí at bakteriur í tarmunum umskapa karnitin til trimethylamin. Trimethylamin verður síðani sodnað í livrini. Tað, ið livurin ikki megnar at sodna, verður frígivið í sveitta og urin og luktar av fiski.

Eru álvarslig sjúkuhjáárin, ring so 112 ella far beinanvegin til læknan ella á skaðastovuna.

Skráset tíni hjáárin

Upplivir tú hesi hjáárin, ella fært tú onnur hjáárin enn tey, ið standa á kunningarlepanum, sig so læknanum ella apotekinum frá.

Hjálp okkum at fáa meira at vita um hjáárin við at boða okkum frá á hjaarin.apotek.fo.

Á hendan hátt kunnu vit í Føroyum eyðmerkja og fylgja við møguligum hjáárinum, ið kunnu standast av heilivágsnýtslu, við serligum atliti til óvæntað og sjáldsom hjáárin.

5. Soleiðis skalt tú goyma Karnitin

Krógva Karnitin tilbúningar fyri børnum.

Skal goymast kaldari enn 25 °C. Tablettirnar eru fuktviðkvæmar og skulu tí goymast í upprunaílati saman við turkihylkinum, sum er í lokinum.

Nýt ikki Karnitin eftir seinasta lokadag, ið stendur á ílatinum.

Lat altíð heilivágsleivdir inn á apotekið til burturbeining.

6. Aðrar upplýsingar

Innihald:

Karnitin FAP 333 mg tablettir hevur í sær hetta virkna evnið:

- L-carnitin L-tartrat, ið svarar til 333 mg av L-carnitini.
- Hini evnini eru: Microcrystalinsk cellulosa, silica colloidal anhydrous, magnesiumstearat og natriumcroscarmellosa.

Karnitin FAP 100 mg/ml oralur loysingur hevur í sær hetta virkna evnið:

- 1 ml inniheldur 100 mg av L-carnitini.
- Hini evnini eru: Reinsað vatn, sorbitol, glycerol, og rasberry flavour. Haldevni: Paraoxybenzoat.

Karnitin FAP 100 mg/ml oralur loysingur (uttan kolhydrat) hevur í sær hetta virkna evnið:

- 1 ml inniheldur 100 mg av L-carnitini.
- Hini evnini eru: Reinsað vatn.
  Haldevni: Paraoxybenzoat.

Útsjónd og støddd:

Karnitin FAP 333 mg tablettir:

- Útsjónd: Tablettirnar eru hvítar, avlangar, uttan deilikervi og við búmerki hjá Apoteksverkinum.
- Støddd: Ílat við 200 stk.

Karnitin FAP oralur loysingur:

- Útsjónd: Vætan er klár, litleys og tjúkt flótandi.
- Støddd: Plastfløska ið er 500 ml.

Karnitin FAP oralur loysingur (uttan kolhydrat):

- Útsjónd: Vætan er klár og litleys.
- Støddd: Plastfløska ið er 500 ml.

Hevur tú fleiri spurningar, skalt tú seta teg í samband við Framleiðsluapotekið á tlf. 404040 ella umvegis fap@apotek.fo.

Kunningarlepi dagførdur 13.08.2026